**Samstarvsfelagi hjá ABC Barnahjálp:**

- **Navn:** ABC Children's Aid-Liberia
- **Bústaður:** Thinkers Village, Monrovia, Liberia, West Africa
- **Postadressa:** P.O Box 2068, Monrovia, Liberia, West Africa
- **Telefon:** 011-2316-571-417 ella 011-23177-571-417
- **Telefax:** Einki
- **Teldupostur:** abcliberia@yahoo.com
- **Heimasíða (um nøkur er):** Eingin
- **Navn á leiðara:** Pastor Matthew Targen Sakeuh
- **Navn á varaleiðara:** Eingin
- **Nøvn á nevndarlimum:** Rev. John Bleah, formaður, Mrs. Lydiah Perlead, kassameistari, Pastor Narmon Wantee, skrivari, Mr. Roland Suomie, limur, pastor Matthew Targen Sakeuh, stjórnarlimur
- **Starvsfólk:** 16
- **Børn, sum búgva á skúlanum (sept. 2008):** 58
- **Børn, sum koma til dagskúlan (sept. 2008):** 0
- **Navn á skúlum (er talan um fleiri) og tal av børnum í hvørjum skúla:** Í løtuni ganga børnini í kristna skúlanum í Paynesville, har tey bíða eftir at verða flutt frá skúlaøkinum til okkara skúla.

- **Akademiskar upplýsingar (møgulig útbúgving): Skúlin, har børnini í løtuni ganga, byrjar við barnaansingarstovum og fram til 9. flokk.**

- **Dagar fyri skúlaskeið og frídagar: Almennir og privatir skúlar í Liberia koyra í semestrum: Fyrsta skúlaskeiðið er frá september til miðjan desember. Annað skúlaskeiðið er frá miðjan januar fram til mai.**
  **Frídagar: Jólasteðgur frá miðjan desember til miðjan januar.**
  **Summarfrí frá miðjan mai til september.**

- **Aðrar upplýsingar**: **Bæði almennir og privatir skúlar í Liberia liggja undir undirvísingarmálaráðnum. Tað, sum undirvísingarmálaráðið fyriskrivar, skal fremjast í øllum skúlum, sum virka í landinum. Tí kunnu hvørki almennir ella privatir skúlar gera sína egnu skúlaætlan. Eitt nú gav undirvísingarmálaráðið í ár boð um, at allir skúlar skuldu byrja aftur tann 1. september. Teir skúlar, sum ikki byrjaðu henda dagin, fingu álagt at verða verandi stongdir fram til næsta skúlaskeið í januar.**

- **Lýsing av einum vanligum degi hjá børnunum í skúlanum /heiminum:**
  **Lat meg fyrst siga tykkum frá, hvussu børnini, sum vit hjálpa, mentust og hvussu teirra liviumstøður broyttust:**

## *Kríggið er av, men sárini síggjast enn*

**Ótryggleiki og oyðilegging, sum eru íkomin frá borgarakrígnum gjøgnum meira enn tíggju ár, nerva framvegis fólkið í Liberia, serliga kvinnur og børn. ”Triðja kríggið”, sum var í 2003, legði alt samferðslukervið í oyði, herundir eisini elveiting til býirnar og rennandi vatn. Fleiri enn 200.000 børn (gentur og dreingir) gjørdust tá eisini foreldraleys. Hóast tjóðartingsvalið í oktober 2005 gevur vón um betri viðurskifti fyri liberianar, so er tørvurin enn alstórur á útbúgving, arbeiði, heilsutænastum, stuðul til børn og einkjur eins og á øðrum sosialum hjálparveitingarskipanum. Hesin tørvurin verður átrokandi í mong ár enn.**

## *Vónin endurreist*

**Pastor Matthew Targen Sakeuh er sjálvur úr Liberia. Hann flýddi úr landinum í 1990, tá borgarakríggj var um at taka seg upp. Áðrenn hann slapp inn á Bethany College of Missions, Minneapolis, Minnesota-USA, búði hann í eini flóttafólkalegu á Fílabeinstrondini í sjey ár. Tað var í hesi somu leguni, at hann giftist og fekk trý tey elstu av sínum fimm børnum. Seinastu ellivu árini hevur hann búð í USA saman við konuni Plenseh og børnunum. Nú pastor Sakeuh hevur tikið doktarastig í gudfrøði, vendi hann aftur til Liberia, har hann virkar sum forstjóri (Executive Director) fyri ABC barnahjálp í Liberia.**

**ABC barnahjálp í Liberia er farin til verka. Nú 294.500 ferðmetrar jørð er keypt, sær pastor Sakeuh fyri sær eitt skúlaøki, sum fer at tæna bæði likamligu og andaligu tørvunum hjá børnunum. Tá arbeiðið er liðugt, fer skúlaøkið at umfata heilsumiðstøð, eina skúlakirkju, ein bráðdepil fyri barnakonur umframt útbúgvingareindir fyri børn frá barnaansingarstovum fram til 12. flokk, yrkisgreinir, tekniskar útbúgvingar sjúkrarøktarfrøðiskúla. Eisini verða miðnámsútbúgvingar og lærdur háskúli.**

**Í løtuni leggja vit síðstu hond á heilsumiðstøðina, sum er nærum liðug. Kristni skúlin hjá ABC er eisini væl áleiðis. Fyrsta byggistigið umfatar átta floksrúm, tíggju læraraskrivstovur, telduhøli, bókasavn, lesirúm og toilett fyri endan á hvørjari eind. Tey 36 kømurini í gentudeildini eru eisini um at vera liðug. Fyrsta byggistig í matarhøllini, har 900 næmingar kunnu sita í senn, er komið í helvt. Byggingin av dreingjadeildini er júst byrjað. Nær hesir bygningar verða endaliga lidnir er treytað av, nær peningur verður tøkur.**

## Slag av skúla/heimi:

**Skúli: Í løtuni ganga øll børnini í okkara skipan í tí privata “Kristna Dagskúlanum”**

**Heim: Í løtuni leiga vit eitt heim til børnini, har vit hava sett Christian Care Givers at veita børnunum kærleika og umsorgan. Børnini fáa tríggjar máltíðir um dagin: á morgni, middegi og á kvøldi. Morgun- og**

kvøldandaktir verða eisini hildnar á heiminum. Børnini hava einki rennandi vatn í bygninginum. Tey fáa reint drekkivatn, bað, vatn at vaska við o.a. frá hondpumpaðum vatni úr felagsbrunninum nærhendis.

Vit hava bæði innandura og uttandura toilettumstøður fyri børnini. Umstøðurnar verða munandi betri, tá skúlaheimið verður liðugt. Tá verður rennandi vatn bæði í skúlaheimunum og í barnaskúlanum.

## Børnini





abc

CHILDREN´S AID

